ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Dagf.: 20. august 2024
Mál: 24/18383
Viðgjørt:

**Nr. 52-011/2024**

**Fyrispurningur eftir tingskipanini § 52 a**

**Svar upp á skrivligan fyrispurning nr. 52-011/2024 eftir tingskipanini § 52 a til Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í almanna- og mentamálum, frá Johan Dahl, løgtingsmanni, um Fyrisitingarútreiðslur á almannaøkinum**

**Spurningar:**

1. Hvussu stórar eru samlaðu útreiðslurnar til ávikavist
   1) fyrisitingarligar uppgávur (lønir, keyp av vørum og tænastum o.a.) og
   2) útinnandi uppgávur á almannaøkinum (lønir, keyp av vørum og tænastum o.a.) í tíðarskeiðinum 2010-2024, býtt upp á funktiónir/ stovnar/ øki í landinum o.a.?
2. Hvussu stórt tal av starvsfólkum (ársverk) eru sett til ávikavist fyrisitingarligar uppgávur og útinnandi uppgávur á almannaøkinum í tíðarskeiðinum 2010-2024, býtt upp á funktiónir / stovnar/ øki í landinum o.a.?
3. Hvussu stór er útskiftingin av starvsfólkunum í fyrisitingini og millum tey, sum røkja útinnandi uppgávurnar?
4. Hvussu er støðan viðvíkjandi rekruttering av starvsfólkum til fyrisitingarligar og útinnandi uppgávurnar, og hvørji eru útlitini?
5. Hvør er gongdin í talinum av brúkarum, veitingum og tænastum í tíðarskeiðinum 2010-2024, býtt upp á øki/ slag, og hvørji eru útlitini?

**Svar**

Almannaøkið fevnir um mong onnur málsøki enn tað, sum formliga hoyrir til heimildarøkið hjá landsstýriskvinnuni í almanna- og mentamálum. Í altjóða hagtalssamstarvi, er almannaøkið allýst á ein ávísan hátt og umframt tað, sum vit í Føroyum vanliga kenna sum almannamál, so fevnir almannaøkið eisini um ávísar heilsutænastur, stuðul til heilivág, arbeiðsloysitrygging, dagstovnaøkið o.a.

Spurt verður um útreiðslur og virksemi á almannaøkinum býtt upp eftir funktión/stovn/øki í landinum o.a., og biðið verður um upplýsingar heilt aftur til 2010, har skilt verður ímillum útreiðslur til ávikavist fyrisitingarligar uppgávur og útinnandi uppgávur. Hetta eru ikki upplýsingar, sum frammanundan eru tøkar, og tí hevur verið neyðugt at framleiða vitan í sambandi við svarið til henda fyrispurningin.

Tað eru málsøki, sum síðstu 14 árini eru flutt frá landi til kommunur, og tað eru játtanir, ið eru flutt millum ymsu málsøkini hjá landsstýrisfólkunum. Eisini skal havast í huga, at inn til 2013 vóru tveir stovnar – ávikavist Almannastovan og Nærverkið, sum ger uppgávuna at samanbera

tíðina áðrenn og aftaná samanleggingina torgreidda. Sostatt skulu upplýsingarnir í hesum svarinum takast við fyrivarni, havandi í huga freistina, sum landsstýriskvinnan hevur at svara.

Landsstýriskvinnan hevur verið noydd at avmarka seg til virkisøkið, sum hoyrir undir Almannaverkið. Almannaverkið umsitur barnaverndarøkið fyri landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálaráðnum, og tí eru útreiðslur hjá landinum til barnavernd tiknar við í hesum svarinum.

Av tí at spurningarnir eru víðfevndir, bæði tá tað snýr seg um tíðarskeiðið og vavið annars, hevur verið neyðugt at gera aðrar avmarkingar og seta ávísar fortreytir upp fyri svarinum.

*Tíðarskeiðið 2010-2024*
Av tí at tað verða nýtt roknskapartøl fyri hvørt ár, og 2024 enn ikki er runnið, er ikki møguligt at taka 2024 við í upplýsingarnar.

Í 2013 vóru tveir stórir stovnar, Nærverkið og Almannastovan, lagdir saman í ein stovn, sum nevnist Almannaverkið, og tað hevur ikki borið til innanfyri freistina at samanbera tíðina áðrenn og aftaná 2013 eftir teimum treytum, sum hesin fyrispurningurin leggur upp til.

Eldraøkið varð lagt til kommunurnar at umsita 1. januar 2015. At samanbera útreiðslur áðrenn og aftaná 2015 krevur eina neyva lýsing av kommunalu eldrarøktini, og tað hevur ikki verið gjørligt í sambandi við hendan fyrispurningin.

Síðani 2015 hevur málsøkið hjá landsstýrisfólkinum í almannamálum og virkisøkið hjá Almannaverkinum við fáum undantøkum verið óbroytt – tó eru smærri øki komin aftrat.

Tískil eru upplýsingarnir viðvíkjandi rakstrinum avmarkaðir til at galda frá 2015 til og við 2023. Av tí at tað krevur nógva orku at framleiða upplýsingar fyri einstøku árini, hevur landsstýriskvinnan avmarkað seg til árini 2015, 2019 og 2023.

Tá tað snýr seg um veitingar, verða spurningarnir svaraðir so langt aftur teir eru skrásettir í Heildarskipanini hjá Almannaverkinum og eftir, nær lógirnar eru komnar í gildi. Her er møguligt í nøkrum førum at svara aftur til 2010 og hvørt ár frameftir.

Á starvsfólkaøkinum eru ávísir upplýsingar, ið spurt verður um, ikki skrásettir longur aftur enn 2019. Tískil verða bert hesi árini tikin við.

*Skipan - funktiónir*
Almannaverkið er bygnaðarliga skipað í tríggjar deplar/funktiónir, sum eru
- Fyrisiting,
- Viðskiftadepilin og
- Trivnaðardepilin.

Viðskiftadepilin og Trivnaðardepilin eru útinnandi liðið. Útinnandi liðið er nógv tann størsti parturin av Almannaverkinum og hevur sostatt bert lítlan part av lønarútreiðslunum til fyrisiting.

Svarini til fyrispurningin eru skipað eftir hesum fortreytum:

Fyrisitingarligar uppgávur: Fyrisitingin/stápsfunktiónin er tikin við øll, sum hon er, íroknað depilsstjóran. Í Viðskiftadeplinum er depilsstjórin tikin við. Í Trivnaðardeplinum eru stjórin og eindarleiðararnir tiknir við.

Útinnandi uppgávur: Tað eru deildarleiðarar og leiðarar í útinnandi liðinum. Hesir hava lutvíst útinnandi uppgávur og lutvíst fyrisitingarligar uppgávur í sambandi við at halda útreiðslur til løn og rakstur í mun til dagliga virksemið á staðnum. Tað ber ikki til at gera ein eintýddan skilnað millum útinnandi uppgávur og fyrisitingarligar uppgávur hjá deildarleiðarum og leiðarum í útinnandi liðinum, tí arbeiðið er ymisliga skipað á frá stað til stað. Tí eru útreiðslur til deildarleiðarar og leiðarar tiknar við í útinnandi liðið.

*Alment um gongdina í útreiðslunum*
Stórur munur er á útreiðslunum til keyp av vørum og tænastum serliga millum 2019 og 2023. Sambært roknskapartølum er stórur vøkstur í útreiðslunum. Høvuðsorsøkin er lønarvøkstur, prístalsvøkstur og øking í talinum av tilboðum. Harafturat hevur Covid-19 verið viðvirkandi til útreiðsluvøkstur í tíðarskeiðinum.

Størsti vøksturin sæst tó í keypi av tænastum til stovnsuppihald í Danmark. Her er talan um nakrar serligar fyriskipanir, sum eru sera kostnaðarmiklar.

## Spurningur 1
*Útreiðslur til fyrisitingarligar uppgávur (lønir, keyp av vørum og tænastum o.a.), býtt upp á funktiónir/ stovnar/øki í landinum o.a.*

| **Fyrisitingarliga virkisøkið í kr.** | | | |
|---|---|---|---|
| | | | |
| **Fyrisiting** | | | |
| **Rakstur** | **2015** | **2019** | **2023** |
| **11 lønir** | 12.249.501 | 16.440.020 | 17.773.537 |
| 14 keyp av vørum og tænastum | 1.196.870 | 770.308 | 647.874 |
| 15 keyp av útbúnaði | 169.621 | 99.948 | 101.472 |
| 16 leiga og viðlíkahald, skattir | 23.017 | 7.218 | 6.399 |
| | **13.639.009** | **17.317.494** | **18.529.282** |
| **Viðskiftadepil** | | | |
| **Rakstur** | **2015** | **2019** | **2023** |
| **11 lønir** | 688.686 | 760.498 | 851.099 |
| 14 keyp av vørum og tænastum | 0 | 0 | 0 |
| 15 keyp av útbúnaði | 0 | 0 | 0 |
| 16 leiga og viðlíkahald, skattir | 0 | 0 | 0 |
| | **688.686** | **760.498** | **851.099** |
| **Trivnartæn.** | | | |
| **Rakstur** | **2015** | **2019** | **2023** |
| **11 lønir** | 7.523.371 | 9.321.296 | 5.041.669 |
| 14 keyp av vørum og tænastum | 0 | 0 | 0 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15 keyp av útbúnaði | 0 | 0 | 0 |
| 16 leiga og viðlíkahald, skattir | 0 | 0 | 0 |
| | **7.523.371** | **9.321.296** | **5.041.669** |

*Kelda: Almannaverkið*

Lutfalsliga stóra lækkingin í lønumútreiðslum frá 2019 til 2023 í *Trivnaðartænastur* skyldast broytingum í bygnaðinum, har farið var frá at hava 3 depilsstjórar til at hava ein depilstjóra, og frá 13 eindarleiðarum til 6 eindarleiðarar.

*Útreiðslur til útinnandi uppgávur (lønir, keyp av vørum og tænastum o.a., býtt upp á funktiónir/stovnar /øki í landinum o.a.*

| **Útinnandi virkisøkið í kr.** | | | |
|---|---|---|---|
| | | | |
| **Fyristing** | | | |
| **Rakstur** | **2015** | **2019** | **2023** |
| **11 lønir** | 0 | 0 | 0 |
| 14 keyp av vørum og tænastum | 0 | 0 | 0 |
| 15 keyp av útbúnaði | 0 | 0 | 0 |
| 16 leiga og viðlíkahald, skattir | 0 | 0 | 0 |
| | **0** | **0** | **0** |

| **Viðskiftadepil** | | | |
|---|---|---|---|
| **Rakstur** | **2015** | **2019** | **2023** |
| **11 lønir** | 44.802.596 | 58.965.882 | 75.054.562 |
| 14 keyp av vørum og tænastum | 7.134.657 | 8.564.984 | 13.471.441 |
| 15 keyp av útbúnaði | 1.843.022 | 4.048.969 | 9.041.480 |
| 16 leiga og viðlíkahald, skattir | 4.729.642 | 5.277.500 | 6.127.047 |
| | **58.509.917** | **76.857.335** | **103.694.530** |

| **Trivnartæn.** | | | |
|---|---|---|---|
| **Rakstur** | **2015** | **2019** | **2023** |
| **11 lønir** | 204.442.416 | 277.887.572 | 330.309.278 |
| 14 keyp av vørum og tænastum | 21.928.185 | 27.899.139 | 50.404.312 |
| 15 keyp av útbúnaði | 3.610.341 | 5.404.407 | 11.709.042 |
| 16 leiga og viðlíkahald, skattir | 7.801.195 | 10.581.734 | 20.450.272 |
| | **237.782.137** | **321.772.852** | **412.872.904** |

*Kelda: Almannaverkið*

Myndin niðanfyri vísir útreiðslurnar fyri fyrisitingarliga virkisøkið í mun til útinnandi virkisøkið í árini 2015, 2019 og 2023.




Talvurnar niðanfyri vísa samlaðu útreiðslurnar til ávikavist fyrisitingarliga virkisøkið og útinnandi virkisøkið, skift á øki í landinum.

| **Fyrisitingarliga virkisøkið** | | | |
|---|---|---|---|
| | **2015** | **2019** | **2023** |
| Streymoy | 16.107.009 | 19.986.247 | 18.135.214 |
| Norðoyggjar | 1.860.633 | 2.454.475 | 2.487.733 |
| Eysturoy | 2.110.291 | 2.340.498 | 1.671.080 |
| Vágar | 870.614 | 1.202.099 | 1.000.587 |
| Suðuroy | 902.519 | 1.044.746 | 832.492 |
| Sandoy | 0 | 371.223 | 294.944 |
| | **21.851.066** | **27.399.288** | **24.422.050** |

| **Útinnandi virkisøkið** | | | |
|---|---|---|---|
| | **2015** | **2019** | **2023** |
| Streymoy | 218.404.865 | 290.778.403 | 383.590.261 |
| Norðoyggjar | 25.229.463 | 35.709.977 | 52.619.747 |
| Eysturoy | 28.614.731 | 34.051.727 | 35.346.159 |
| Vágar | 11.805.185 | 17.489.246 | 21.164.101 |
| Suðuroy | 12.237.810 | 15.199.937 | 17.608.599 |
| Sandoy | 0 | 5.400.897 | 6.238.567 |
| | **296.292.054** | **398.630.187** | **516.567.434** |

*Kelda: Almannaverkið*

Upphæddirnar í talvunum eru tiknar úr skipanini hjá Almannaverkinum, men fyrivarni skal takast fyri, at allar rakstrarútreiðslur ikki altíð eru skrásettar út á øki, og tí er í ein ávísan mun talan um eina meting. Eitt dømi eru stuðulstoymi, sum arbeiða í ymiskum økjum og tí ikki skrásett í einum ávísum øki.

**Spurningur 2**
*Hvussu stórt tal av starvsfólkum (ársverk) eru sett til ávikavist fyrisitingarligar uppgávur og útinnandi uppgávur á almannaøkinum, býtt upp á funktiónir / stovnar/ øki í landinum o.a.?*

Myndin niðanfyri vísir tal av ársverkum skift á funktiónir fyri árini 2015, 2019 og 2023. Hesi árini hava ávikavist 670, 801 og 877 ársverk arbeitt í Almannaverkinum, og býta tey seg soleiðis millum Trivnaðardepilin, Viðskiftadepilin og Fyrisitingina:




*Kelda: Lønarkunning hjá Gjaldstovuni*

**Spurningur 3**
*Hvussu stór er útskiftingin av starvsfólkunum í fyrisitingini og millum tey, sum røkja útinnandi uppgávurnar?*

Myndin niðanfyri vísir starvsútskiftið í prosent fyri árið 2023.




*Kelda: Lønarkunning hjá Gjaldstovuni*

**Spurningur 4**
*Hvussu er støðan viðvíkjandi rekruttering av starvsfólkum til fyrisitingarligar og útinnandi uppgávurnar, og hvørji eru útlitini?*

Myndin niðanfyri vísir umsøkjarar pr. starv í miðal fyri Almannaverkið í 2023.



*Kelda: Almannaverkið*

Í 2023 vóru í miðal 2,01 umsøkjari til hvørt starv, sum Almannaverkið lýsti leyst. Í 2022 var talið 2,69 og í 2021 1,86.

Almannaverkið upplýsir, at í 2023 var talið av umsøkjarum til hvørt starv er hægst í Fyrisitingini (4,13) og lægst í Trivnaðadeplinum (1,92).

Tølini vísa, at støðan viðvíkjandi rekrutteringin av starvsfólkum til fyrisitingarligar uppgávur er betri enn støðan viðvíkjandi rekruttering av starvsfólkum til útinnandi uppgávur.

Hvørji útlitini eru, er trupult at meta um. Líkt er til, at eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi er størri enn útboðið í løtuni, og at tað hevur verið soleiðis í nøkur ár.

**Spurningur 5**
*Hvør er gongdin í talinum av brúkarum, veitingum og tænastum í tíðarskeiðinum 2010-2024, býtt upp á øki/ slag, og hvørji eru útlitini?*

Myndin niðanfyri vísir tal av borgarum, sum hava fingið veiting frá Almannaverkinum í árinum. Tað merkir, at hetta eru ymiskir persónar, sum hava fingið í minsta lagi eina veiting í árinum. Talan kann sostatt vera um persónar, sum hava fingið eina veiting einaferð, og um persónar, sum varandi fáa veiting frá Almannaverkinum. Um ein borgari t.d. hevur fingið bæði familjuískoyti og fyritíðarpensjón, telur hann við tvær ferðir.

Tølini eru frá Løgtingsfíggjarlógini. Nærum bert veitingar og endurgjøld verða uppgjørd í hesum talvum.

| **Tal av borgarum sum fáa veiting** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023*)** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tal** | | | | | | | | | |
| **Barnavernd** | 2 | 2 | 4 | 7 | 7 | 7 | 5 | 4 | 4 |
| **Einkjubarnastyrkur, barnagjald** | *157* | *122* | *102* | *111* | *113* | *113* | *101* | *107* | *111* |
| **Barnapeningur veittur í forskoti** | *678* | *664* | *640* | *617* | *594* | *585* | *557* | *539* | *509* |
| **Stuðul til uppihaldspening (1/2 árligt)** | *236* | *242* | *239* | *228* | *182* | *243* | 213 | 213 | 209 |
| **Barnaískoyti (1/4 árligt)** | *843* | *858* | *846* | *848* | *866* | *890* | *875* | *899* | *911* |
| **Familjuískoyti** | *0* | *322* | *365* | *403* | *435* | *422* | 385 | 403 | 419 |
| **Ættleiðingarstuðul** | *2* | *6* | *1* | *2* | *2* | *2* | 3 | 3 | 0 |
| **DAGPENINGASKIPANIN** | | | | | | | | | |

| | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Dagpeningaskipanin, løntakarar** | 2.312 | 2.309 | 2.525 | 2.760 | 2.696 | 2.928 | 3.064 | 3.982 | 2.751 |
| **Dagpeningaskipanin, sjálvstøðug o.a.** | 41 | 48 | 80 | 94 | 102 | 121 | 140 | 157 | 165 |
| VANLIG FORSORG | | | | | | | | | |
| **Uppihaldshjálp** | 591 | 535 | 520 | 602 | 578 | 558 | 553 | 564 | 605 |
| **Varandi veiting** | 7 | 6 | 2 | 2 | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 |
| **Stakútreiðslur** | 211 | 198 | 155 | 117 | 105 | 105 | 63 | 78 | 132 |
| **Serligur stuðul** | 9 | 34 | 42 | 58 | 60 | 52 | 50 | 54 | 56 |
| **Inntøkumissur** | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 128 | 136 | 167 |
| **Arbeiðsloysisforsorg** | 509 | 513 | 384 | 326 | 225 | 222 | 166 | 138 | 156 |
| **Serligar fyriskipanir** | 5 | 6 | 7 | 7 | 2 | 6 | 6 | 5 | 7 |
| **Arbeiðsfremjandi tiltøk **)** | | | | | | | | | |
| **Arbeiðsbúgving** | 495 | 564 | 462 | 429 | 391 | 332 | 448 | 403 | 401 |
| **Tillagað starv** | 115 | 135 | 184 | 240 | 304 | 384 | 401 | 463 | 527 |
| **Vard størv (10-12 inkl. arb.fremj)** | 122 | 101 | 93 | 92 | 63 | 57 | 57 | 44 | 44 |
| **SOSIALAR PENSJÓNIR** | | | | | | | | | |
| **Fólkapensjón (gomul)** | **8.022** | 8.058 | 8.305 | 8.511 | 8.667 | 8.336 | **8.000** | **7.637** | **7.224** |
| **Pensjónsnýskipan** | **0** | 0 | 0 | 0 | 0 | 424 | **874** | **1.306** | **1.751** |
| **Hægsta fyritíðarpensjón** | 931 | 986 | 1.032 | 1.134 | 1.189 | 1.289 | 1.381 | 1.463 | 1.533 |
| **Miðal fyritíðarpensjón** | 711 | 651 | 591 | 554 | 476 | 437 | 377 | 351 | 283 |
| **Lægsta fyritíðarpensjón** | 330 | 309 | 276 | 270 | 247 | 230 | 240 | 231 | 194 |
| **Framskundað pensjón** | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 16 | 38 | 43 | 25 |
| **Fyritíðarpensjón, avlamisveiting** | 119 | 118 | 110 | 104 | 105 | 100 | 95 | 95 | 96 |
| **Viðbót til ávísar pensjónistar ***)** | **8.560** | **8.059** | **5.536** | **5.650** | **5.311** | **5.733** | **5.619** | **5.606** | **5.223** |

*) Fyribils tøl
**) Arbeiðsfremjandi tiltøk er ikki reglufast fyrr enn í 2016
***) Broyttur uppgerðarháttur 2015-2016

Stuðul til hjálparráð, meirútreiðslur til foreldur at barni, ið ber brek og læknaváttanir eru ikki við. Hetta eru rokningar, sum verða játtaðar 3. parti vegna ein borgara, sum fær játtað eina útreiðslu.

Fyri at geva eina fatan av gongdini er í talvuni niðanfyri eitt yvirlit yvir miðal útgjald pr. borgara. Tað skal gerast vart við, at talan er um roknað tøl, har samlaðu útreiðslurnar eru býttar við tal av borgarum, sum hava móttikið einstøku veitingina. Nakrir borgarar hava fingið veiting alt árið, meðan aðrir borgarar bert hava fingið veiting í ein ella nakrar mánaðir. Upphæddirnar eru sostatt ikki svarandi til satsirnar til einstøku veitingarnar.

| ÁRLIG VEITING – MIÐAL KR. | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023*) |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| BARNASTUÐUL | | | | | | | | | |
| **Barnavernd** | 414.351 | 451.589 | 282.783 | 721.051 | 1.464.927 | 1.177.373 | 689.713 | 1.594.648 | 1.426.117 |
| **Einkjubarnast. barnagjald** | 11.827 | 14.069 | 17.506 | 16.987 | 16.830 | 16.791 | 16.852 | 21.023 | 15.986 |
| **Barnapeningur í forskoti** | 835 | 1.071 | 1.662 | -59 | 1.791 | 679 | -667 | -167 | -8.080 |
| **Stuðul til uppihaldspening** | 10.149 | 9.986 | 9.997 | 12.090 | 12.875 | 10.019 | 11.452 | 10.638 | 10.738 |
| **Barnaískoyti (1/4 árligt)** | 13.474 | 13.477 | 13.562 | 13.800 | 13.822 | 14.008 | 14.208 | 14.230 | 14.913 |
| **Familjuískoyti** | | 12.505 | 13.226 | 13.620 | 23.379 | 25.585 | 25.541 | 24.452 | 32.265 |
| **Ættleiðingarstuðul** | 100.000 | 100.000 | 100.000 | 100.000 | 100.000 | 100.000 | 100.000 | 100.000 | 0 |
| **DAGPENING** | | | | | | | | | |
| **Dagpening. løntakarar** | 23.837 | 23.133 | 22.856 | 23.160 | 26.846 | 27.901 | 26.594 | 24.615 | 31.291 |

| | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Dagpening.sjálvstøðug o.a.** | 16.251 | 15.782 | 9.861 | 9.716 | 9.411 | 13.998 | 13.869 | 17.847 | 10.410 |
| **SOSIALAR SKIPANIR** | | | | | | | | | |
| **Uppihaldshjálp** | 55.963 | 57.888 | 62.456 | 58.218 | 67.824 | 65.557 | 68.134 | 68.474 | 73.895 |
| **Varandi veiting** | 101.833 | 102.835 | 130.249 | 114.066 | 37.518 | 0 | 0 | 223.702 | 188.192 |
| **Stakútreiðslur** | 8.955 | 9.043 | 10.263 | 13.793 | 12.912 | 11.211 | 9.306 | 13.451 | 10.791 |
| **Serligur stuðul** | 0 | 2.966 | 45.241 | 57.770 | 58.520 | 62.536 | 92.649 | 121.804 | 87.532 |
| **Inntøkumissur** | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 95.984 | 105.364 | 104.889 |
| **Arbeiðsloysisforsorg** | 55.398 | 55.383 | 61.515 | 47.375 | 50.816 | 51.281 | 51.020 | 49.384 | 50.112 |
| **Serligar fyriskipanir** | 591.317 | 674.884 | 1.421.991 | 948.983 | 1.956.709 | 833.040 | 781.296 | 1.220.273 | 1.220.720 |
| **Arbeiðsfremjandi tiltøk** | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Arbeiðsbúgving** | 75677 | 64507 | 74.575 | 76.319 | 82.602 | 91.578 | 75.379 | 102.268 | 103.311 |
| **Tillagað starv** | 96252 | 125622 | 118.231 | 141.774 | 164.335 | 163.243 | 184.691 | 179.778 | 180.948 |
| **Vard størv** | 137.095 | 145.630 | 136.317 | 130.926 | 147.903 | 133.926 | 173.631 | 159.151 | 143.583 |
| **SOSIALAR PENSJÓNIR** | | | | | | | | | |
| **Fólkapensjón íalt** | | | | | | | | | |
| **Fólkapensjón (gomul)** | 63.346 | 60.524 | 60.430 | 60.494 | 60.298 | 68.809 | 72.394 | 74.776 | 76.080 |
| **Pensjónsnýskipan** | | | | | | 25.839 | 48.139 | 58.856 | 63.869 |
| **Hægsta fyritíðarpensjón** | 160.872 | 162.783 | 161.575 | 147.984 | 150.408 | 149.726 | 151.408 | 151.380 | 154.516 |
| **Miðal fyritíðarpensjón** | 98.648 | 101.808 | 104.624 | 107.044 | 111.490 | 107.902 | 107.896 | 102.588 | 110.560 |
| **Lægsta fyritíðarpensjón** | 97.050 | 95.412 | 96.510 | 101.751 | 104.512 | 109.419 | 102.826 | 94.629 | 106.124 |
| **Framskundað pensjón** | | | | | | 91.535 | 117.127 | 104.230 | 108.902 |
| **Fyritíðarp., avlamisveiting** | 9.148 | 8.066 | 9.251 | 5.657 | 10.074 | 10.205 | 9.387 | 10.045 | 8.981 |
| **Viðbót til ávísar pensj.** | 3.583 | 3.817 | 4.707 | 5.624 | 5.786 | 5.627 | 5.679 | 5.686 | 5.776 |

Tað hevur ikki verið møguligt at fáa til vega allar veitingar aftur til 2015, av tí at Heildarskipanin hjá Almannaverkinum ikki hevur verið virkin á øllum økjum í hesum tíðarskeiðið.

Talvan niðanfyri vísir tal av borgarum sum hava fingið trivnaðartænastu. Tølini verða ikki uppgjørd eftir kostnaði pr. tilboð. Tølini í 2023 eru ikki endalig.

Niðanfyri eru veitingarnar uppgjørdar eftir øki. Tølini eru uppgjørd í november fyri ávikavist

| Trivnaðartænastur | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | R 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **TAL** | | | | | | | | | |
| **Tal fastbúgvandi** | 194 | 218 | 224 | 241 | 243 | 240 | 250 | 247 | 252 |
| **Tal av stovnsplássum fyri børn og ung** | 20 | 23 | 22 | 25 | 21 | 25 | 27 | 19 | 0 |
| **Tal av vaksnum, sum fáa stuðul** | 179 | 200 | 238 | 242 | 225 | 253 | 235 | 314 | 358 |
| **Tal av børnum, sum fáa stuðul og/ella onnur tilboð** | 108 | 90 | 70 | 84 | 72 | 75 | 97 | 122 | 106 |
| **Tal av umlættingum** | 30 | 45 | 47 | 62 | 75 | 78 | 75 | 80 | 67 |
| **Verkstaðspláss** | 161 | 166 | 173 | 179 | 184 | 180 | 193 | 190 | 183 |
| **Annað (SSM, toymi v.m. )** | | | 0 | 45 | 34 | 48 | 45 | 16 | 0 |
| **UPPHÆDD** | | | | | | | | | |
| **Trivnaðartænastur í tkr.** | 239.429 | 263.237 | 286.618 | 306.645 | 321.523 | 346.994 | 383.976 | 372.321 | 407.804 |

2015, 2019 og 2023.

Forskotsrindað barnagjald




*Kelda: Almannaverkið*

Talvan niðanfyri vísir ávikavist fólkatal og tal av forskotsrindaðum barnagjaldið í prosent skift á øki fyri 2019 og 2023

| 0-17 ár | 2015 | | 2019 | | 2023 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Fólk | Forsk. Barnagj | Fólk | Forsk. Barnagj | Fólk | Forsk. Barnagj |
| Norðoya sýsla | 12% | 10% | 11% | 11% | 11% | 10% |
| Eysturoyar sýsla | 23% | 17% | 23% | 18% | 24% | 18% |
| Streymoyar sýsla | 48% | 47% | 49% | 51% | 48% | 54% |
| Vága sýsla | 7% | 6% | 7% | 6% | 7% | 7% |
| Sandoyar sýsla | 2% | 3% | 2% | 3% | 2% | 2% |
| Suðuroyar sýsla | 8% | 8% | 8% | 7% | 8% | 8% |
| Uttanlands | 0% | 10% | 0% | 6% | 0% | 1% |

*Kelda: Almannaverkið*

*Familjuískoyti*

Myndin vísir tal av útgoldnum familjuískoyti fyri ávikavist 2019 og 2023 skift á øki (løgtingslóg um familjuískoyti ikki í gildi í 2015).

52-011/2024




*Kelda: Almannaverkið*

Talvan niðanfyri vísir ávikavist fólkatal og tal  av famljuískoytisveitingum í prosent skift á øki fyri 2019 og 2023

| 16-66 ár | 2019 | | 2023 | |
|---|---|---|---|---|
| | Fólk | Familjuískoyti | Fólk | Familjuískoyti |
| Norðoya øki | 12% | 9% | 12% | 7% |
| Eysturoyar øki | 23% | 15% | 23% | 14% |
| Norðstreymoyar øki | 7% | 8% | 7% | 9% |
| Suðurstreymoyar øki | 41% | 47% | 42% | 48% |
| Vága øki | 6% | 4% | 6% | 6% |
| Sandoyar øki | 2% | 2% | 2% | 3% |
| Suðuroyar øki | 9% | 10% | 8% | 12% |
| Uttanlands | | 5% | | 1% |

*Kelda: Almannaverkið*

*Dagpeningur vegna sjúku*

Myndin vísir tal av fráverudøgum í sambandi við sjúkradagpening fyri ávikavist 2015, 2019 og 2023, skift á øki.




*Kelda: Almannaverkið*

Talvan niðanfyri vísir ávikavist fólkatal og tal av útgoldnum dagpeningi í prosent, skift á øki fyri 2015, 2019 og 2023.

| 16-66 ár | 2015 | | 2019 | | 2023 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Fólk | Dagpening | Fólk | Dagpening | Fólk | Dagpening |
| Norðoya øki | 12% | 12% | 12% | 14% | 12% | 15% |
| Eysturoyar øki | 22% | 25% | 23% | 26% | 23% | 27% |
| Norðstreymoyar øki | 8% | 9% | 7% | 6% | 7% | 6% |
| Suðurstreymoyar øki | 41% | 23% | 41% | 23% | 42% | 27% |
| Vága øki | 6% | 7% | 6% | 7% | 6% | 7% |
| Sandoyar øki | 2% | 2% | 2% | 2% | 2% | 2% |
| Suðuroyar øki | 9% | 16% | 9% | 13% | 8% | 12% |
| Uttanlands | | 6% | | 9% | | 4% |

*Kelda: Almannaverkið*

*Fyribils uppihaldsveiting*

Myndin niðanfyri vísir tal av fólkum, ið hava móttikið fyribils uppihaldsveiting fyri ávikavist 2015, 2019 og 2023, skift á øki. Fyribils uppihaldsveiting er uppihaldshjálp, sum m.a. fevnir um barnsburð, sjúku, vantandi barnaansing og aðra almannahending umframt arbeiðsloysi og serligan stuðul.




*Kelda: Almannaverkið*

Talvan niðanfyri vísir ávikavist fólkatal og tal fólkum, ið hava móttikið fyribils uppihaldsveiting í prosent skift á øki fyri 2015, 2019 og 2023.

| 16-66 ár | | 2015 | | 2019 | | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Fólk | Uppihaldsv. | Fólk | Uppihaldsv. | Fólk | Uppihaldsv. |
| Norðoya øki | 12% | 11% | 12% | 9% | 12% | 13% |
| Eysturoyar øki | 22% | 14% | 23% | 19% | 23% | 20% |
| Norðstreymoyar øki | 8% | 7% | 7% | 7% | 7% | 7% |
| Suðurstreymoyar øki | 41% | 42% | 41% | 37% | 42% | 46% |
| Vága øki | 6% | 5% | 6% | 5% | 6% | 4% |
| Sandoyar øki | 2% | 3% | 2% | 4% | 2% | 2% |
| Suðuroyar øki | 9% | 11% | 9% | 13% | 8% | 7% |
| Uttanlands | | 8% | 0% | 6% | 0% | 2% |

*Kelda: Almannaverkið*

Orsøkin til, at lutfalsliga nógv búgva uttanlands kemst av, at bústaðurin er gjørdur upp í mun til í dag. T.v.s. hetta eru fólk, sum eru flutt uttanlands eftirfylgjandi.

*Børn, ið bera brek - endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku*
Myndin niðanfyri vísir tal av fólkum, ið hava móttikið endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, tí tey ansa barni, ið ber brek, fyri ávikavist 2019 og 2023, skift á øki. 2015 er ikki við í hesi uppgerðini.




*Kelda: Almannaverkið*

Talvan niðanfyri vísir ávikavist fólkatal og tal av fólki, ið hava móttikið endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku í prosent, skift á øki fyri, 2019 og 2023.

| 16-66 ár | 2019 | | 2023 | |
|---|---|---|---|---|
| | Fólk | Mist arb,innt. | Fólk | Mist arb,innt. |
| Norðoya øki | 12% | 12% | 12% | 10% |
| Eysturoyar øki | 23% | 36% | 23% | 26% |
| Norðstreymoyar øki | 7% | 10% | 7% | 15% |
| Suðurstreymoyar øki | 41% | 19% | 42% | 30% |
| Vága øki | 6% | 8% | 6% | 12% |
| Sandoyar øki | 2% | 1% | 2% | 5% |
| Suðuroyar øki | 9% | 9% | 8% | 1% |
| Uttanlands | | 4% | | 1% |

*Kelda: Almannaverkið*

*Arbeiðsfremjandi tiltøk*

Myndin niðanfyri vísir tal av fólkum, ið fáa veiting sbrt. løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk fyri árini 2019 og 2023. Í 2015 vóru arbeiðsfremjandi tiltøk ikki løgd inn í heildarskipanina hjá Almannaverkinum, og tí hevur ikki innanfyri freistina borið til at fáa til vega upplýsingar fyri 2015.

Tillagað starv er við í tølunum, men vard størv eru ikki við. Vard størv verða goldin eftir rokning frá arbeiðsgevara.




*Kelda: Almannaverkið*

Talvan niðanfyri vísir ávikavist fólkatal og tal av persónum í arbeiðsfremjandi tiltaki í prosent skift á øki fyri 2019 og 2023.

| 16-66 ár | 2019 | | 2023 | |
|---|---|---|---|---|
| | **Fólk** | **Arbfr. tiltøk** | **Fólk** | **Arbfr. tiltøk** |
| **Norðoya øki** | 12% | 12% | 12% | 11% |
| **Eysturoyar øki** | 23% | 6% | 23% | 9% |
| **Norðstreymoyar øki** | 7% | 1% | 7% | 3% |
| **Suðurstreymoyar øki** | 41% | 14% | 42% | 18% |
| **Vága øki** | 6% | 1% | 6% | 2% |
| **Sandoyar øki** | 2% | 0% | 2% | 1% |
| **Suðuroyar øki** | 9% | 1% | 8% | 4% |
| **Uttanlands** | | 1% | | 0% |

*Kelda: Almannaverkið*

*Fólkapensjón*

Myndin niðanfyri vísir tal av fólkapensjónistum fyri ávikavist 2015, 2019 og 2023, skift á øki.




*Kelda: Almannaverkið*

Talvan niðanfyri vísir fólkatal og tal av fólkapensjónistum í prosent, skift á øki fyri 2015, 2019 og 2023.

| **67+ ár** | 2015 | | 2019 | | 2023 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Fólk** | **FP** | **Fólk** | **FP** | **Fólk** | **FP** |
| Norðoya øki | 13% | 12% | 12% | 12% | 12% | 12% |
| Eysturoyar øki | 22% | 21% | 22% | 21% | 21% | 21% |
| Norðstreymoyar øki | 8% | 8% | 8% | 8% | 8% | 8% |
| Suðurstreymoyar øki | 36% | 35% | 37% | 36% | 37% | 36% |
| Vága øki | 6% | 6% | 6% | 6% | 7% | 6% |
| Sandoyar øki | 4% | 3% | 3% | 3% | 3% | 3% |
| Suðuroyar øki | 12% | 11% | 12% | 11% | 11% | 11% |
| Uttanlands | | 4% | | 3% | | 3% |

*Kelda: Almannaverkið*

*Fyritíðarpensjón*

Myndin niðanfyri vísir tal av fyritíðarpensjónistum fyri árini 2015, 2019 og 2023, skift á øki. Fyritíðarpensjónirnar fevna um hægstu-, miðal- og lægstu fyritíðarpensjón umframt framskundað pensjón.



*Kelda: Almannaverkið*

Talvan niðanfyri vísir ávikavist fólkatal og tal av fyritíðarpensjónistum í prosent skift á øki fyri 2015, 2019 og 2023.

| 16-66 ár | 2015 | | 2019 | | 2023 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Fólk** | **FTP** | **Fólk** | **FTP** | **Fólk** | **FTP** |
| Norðoya øki | 12% | 14% | 12% | 14% | 12% | 14% |
| Eysturoyar øki | 22% | 17% | 23% | 17% | 23% | 20% |
| Norðstreymoyar øki | 8% | 6% | 7% | 6% | 7% | 6% |
| Suðurstreymoyar øki | 41% | 32% | 41% | 34% | 42% | 34% |
| Vága øki | 6% | 6% | 6% | 6% | 6% | 6% |
| Sandoyar øki | 2% | 4% | 2% | 4% | 2% | 3% |
| Suðuroyar øki | 9% | 14% | 9% | 13% | 8% | 15% |
| Uttanlands | | 5% | | 6% | | 4% |

*Kelda: Almannaverkið*

*Viðbót til ávísar pensjónistar*
Myndin vísir tal av fólkum, ið hava móttikið veitingina *viðbót til ávísar pensjónistar* fyri árini 2015, 2019 og 2023, skift á øki. Viðbót til ávísar pensjónistar er ein viðbót bæði til fólka- og fyritíðarpensjónistar.




*Kelda: Almannaverkið*

Talvan niðanfyri vísir fólkatal og tal  av viðbótum til ávísar pensjónistar í prosent skift á øki fyri 2015, 2019 og 2023.

| 16 og eldri | 2015 | | 2019 | | 2023 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Fólk | Viðbót ávís. pensj. | Fólk | Viðbót ávís. pensj. | Fólk | Viðbót ávís. pensj. |
| Norðoya øki | 12% | 14% | 12% | 12% | 12% | 12% |
| Eysturoyar øki | 22% | 21% | 22% | 22% | 23% | 23% |
| Norðstreymoyar øki | 8% | 8% | 8% | 9% | 7% | 9% |
| Suðurstreymoyar øki | 40% | 31% | 40% | 31% | 41% | 31% |
| Vága øki | 6% | 7% | 6% | 7% | 6% | 7% |
| Sandoyar øki | 3% | 4% | 3% | 4% | 2% | 4% |
| Suðuroyar øki | 10% | 14% | 9% | 15% | 9% | 15% |
| Uttanlands | | 1% | | 1% | | 0% |

*Kelda: Almannaverkið*

*Trivnaðartænastur*
Myndin vísir tal av persónum, sum hava fingið trivnaðartænastu fyri árini 2019 og 2023, skift á øki. Almannaverkið hevur ikki hesa uppgerð fyri 2015.




*Kelda: Almannaverkið*

Talvan niðanfyri vísir ávikavist fólkatal og tal av borgarum sum hava fingið trivnaðartænastu í prosent skift á øki fyri 2019 og 2023.

| Fólkatal íalt | 2019 | | 2023 | |
|---|---|---|---|---|
| | Fólk | Trivnaðart. | Fólk | Trivnaðart. |
| Norðoya øki | 12% | 14% | 12% | 14% |
| Eysturoyar øki | 23% | 18% | 23% | 17% |
| Streymoy | 48% | 55% | 48% | 55% |
| Vága øki | 6% | 5% | 6% | 7% |
| Sandoyar øki | 2% | 2% | 2% | 2% |
| Suðuroyar øki | 9% | 5% | 8% | 5% |

*Kelda: Almannaverkið*

*Útlitini*

Hvussu útlitini eru fyri ymsu veitingarnar og tænasturnar hevur ikki borið til at meta um í sambandi við hendan spurningin. Hetta er eitt arbeiðið, sum er í gongd í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri komandi ár.

Tórshavn, 20. august 2024

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna